## Gav arbeiðsgevara viðhald

Rætturin gav arbeiðsgevara viðhald

Uppsøgd kvinna, sum fekk viðhald í Javnstøðunevndini, fekk ikki viðhald í Føroya Rætti.

Føroya Rættur hevur givið til kennar, at arbeiðsgevari hevur lyft próvbyrðuna í mun til uppsøgn av kvinnu, sum var við barn.

Málið snýr seg um, at ein kvinna, sum varð sett í starv hjá einum av limum Føroya Arbeiðsgevarafelags, var saman við seks øðrum í november 2008 uppsøgd, tí fyritøkan mátti tillaga virksemi til búskaparligu støðuna í Føroyum.

Kvinnan var byrjað í starvinum ein mánaða undan uppsøgnini og metti ikki, at fíggjarstøðan hjá fyritøkuni kundi vera broytt so nógv hesa stuttu tíðina. Kvinnan metti, at hon var uppsøgd, tí hon var við barn, og kærdi málið til Javnstøðunevndina. Ein meiriluti í Javnstøðunevndini metti, at hon hevði verið fyri týðandi mismuni vegna viðgongu og gav henni viðhald sambært § 6 í javnstøðulógini. Eisini varð mælt til eina samsýning á 230.000 kr til kvinnuna frá fyritøkuni.

Fyritøkan var als ikki samd við Javnstøðunevndina og vildi tí ikki rinda nevndu samsýning. Kvinnan legði tí málið fyri Føroya Rætt. Dómur varð ikki sagdur í málinum, av tí at kvinnan tók málið aftur, eftir at Føroya Rættur skrivliga hevði givið til kennar, at arbeiðsgevarin fór at verða frífunnin í málinum.

Rætturin legði til grund fyri frífinningini, at arbeiðsgevarin hevði lyft próvbyrðuna fyri, at avgerðin um uppsøgnina ikki var grundað á viðgonguna hjá kvinnuni. Rætturin legði m.a. dent á, at arbeiðsgevarin hevði tikið avgerð um uppsøgnina, áðrenn hann varð kunnaður um, at kvinnan var við barn. At kvinnan hevði verið í starvi so stutt, broytti ikki hetta.

## Tá Blithesome gekk burtur



Tá Blithesome gekk burtur

Á Torginum á Rás2 í annaðkvøld verður ein spennandi og sonn frásøgn um, tá »Blithesome« gekk burtur. Eisini fara vit at hoyra ein kendan klaksvíking syngja nakrar sangir – tá var hann bert fimm ára gamal. Torgið verður sent beinleiðis úr Klaksvík.

Kári Kjelnæs leggur til rættis.



## Skeivur Mourits

Í grein í blaðnum næstsíðsta fríggjadag høvdu vit grein, sum Mourits M. Joensen hevði skrivað. Men tað var skeivur Mourits á myndini. Vit biðja teir og lesararnar halda okkum til góðar. Tann rætti Mourits M. Joensen, sum skrivað hevði, er hesin, sum sæst á myndini.

# Heiligávur fyri hjarta kann elva til bróstkrabba

**HEILIVÁGUR Nýggjar rannsóknir benda á, at kvinnur, sum brúka hjartaheilivágin digoxin, eru í størri vanda fyri at fáa bróstkrabba enn aðrar kvinnur**



Árni Joensen

Tíðarritið Journal of Clinical Oncology skrivar, at danskar rannsóknir vísa, at kvinnur, sum taka digoxin orsakað av hjartatrupulleikum og óregluligum hjartaslátti, eru í 40 prosent størri vanda fyri at fáa bróstkrabba enn kvinnur, sum ikki brúka heilivágin.

Kanningarnar umfataðu kvinnur, sum tóku digozin í árunum frá 1995 til 2008. Niðurstøðan er, at av 104.648 kvinnum høvdu 2.144 fingið bróstkrabba. Harafturat vísti tað seg, at hjá kvinnum, sum góvust at taka heilivágin, minkaði vandin fyri bróstkrabba.

Um orsøkina til at digoxin økir vandan fyri bróstkrabba siga teir donsku granskararnir, at heilivágurin virkar á líknandi hátt sum østrogen, og tað er gomul vitan, at tað hormonið økir vandan fyri krabbameini.

Granskararnir gera tó vart við, at ágóðin av at brúka digoxin fyri hjartatrupulleikar kann vera størri enn tann økti vandin fyri krabbameini.

Fyri tveimum árum síðani noyddist heilivágvirkið Actavis Totowa, ið ger hjartaheilivágin digitek, ið virkar eins og digoxin, at taka vøruna av marknaðinum, tí tað vísti seg, at summar tablettir vóru tvær ferðir størri, enn tær áttu at vera. Av tí sama var vandi fyri, at fólk fingu nógv meiri heilivág, enn tey áttu at fáa.

# Skerja tyrluflúgving til útoyggj

**TYRLUFLÚGVING Ósemja um sáttmálan millum Atlantsflog og landsstýrið førir við sær, at útoyggjaflúgvingin verður skerd restina av árinum**




Eirikur Lindenskov

31. desember 2010 gekk fimm-ára sáttmálin við Atlantic Airways um útoyggjaflúgving út. Samstundis gekk tíggju-ára sáttmálin millum Fiskimálaráðið og Atlantsflog um tyrlutilbúgving út.

Sáttmálarnir hava báðir verið mest sum óbroyttir í áramálinum, sjálvt um viðurskiftini og fortreytirnar hava verið nógv broyttar hesi ár. Eitt nú átti Føroya landsstýri aðra tyrluna, tá sáttmálin tók við, meðan Atlantsflog eigur nú tvær tyrlur, ið betur hóska til flúgvingina her hjá okkum. Kortini lýkur hvørgin teirra tey herdu krøv, ið mugu verða sett, og ein uppstiging av tyrlunum er ikki kostnaðarleys og tekur tíð.

– Tað eydnaðist ikki at koma á mál at fáa ein nýggjan sáttmála upp á pláss, sum fevnir um báðar flúgvingarnar, í fíggjarlógini fyri 2011, og tí hevur verið roynt at hildið somu tyrlutænastu uppi fyrsta ársfjórðing og í hesum sama tíðarskeiðið at finna eina ávegis framtíðar loysn og fígging fyri henni, sigur Johan Dahl.

Men tað hevur ikki eydnast, og landsstýrismaðurin staðfestir nú, at roknast má við skerdari útoyggjaflúgving restina av árinum og meðan roynt verður at finna fram til trygga framtíðar loysn.

- Strandferðslan fer nú at taka upp samráðingar við Útoyggjafelagið og onnur, sum hava áhuga í útoyggjaflúgvingini, so tvørleikar og ampar av einari skerjing í verandi ferðaætlan og tænastu frá 1. mai at rokna verða minst møguligir, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum.